gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Smyril Line skal støðugt betra seg

**– Tað er umráðandi, at Smyril Line veitir eina góða tænastu, og vit skulu allatíðina ansa eftir, at neyðugu betringarnar verða gjørdar, sigur Tormóður Djurhuus, nýggjur nevndarformaður í Smyril Line**

SMYRIL LINE
*Eyðun Klakstein*



*– Hyggja vit eftir, hvaðani partapeningurin í Smyril Line er, kunnu vit staðfesta, at hetta eru lond, sum hava somu áhugamál sum Føroyar. Tí rokni eg als ikki við trupulleikum í nevndararbeiðnum. Vit hava felagsáhugamál í hesum sambandi, og teimum áhugamálum skulu vit arbeiða fyri, sigur Tormóður Djurhuus, nýggjur nevndarformaður í Smyril Line*

Advokaturin Tormóður Djurhuus er nýggjur nevndarformaður í Smyril Line, og hann skal standa á odda fyri felagnum, sum hevur stórar avbjóðingar fyri framman.

– Eg brúkti ikki langa tíð til at umhugsa tilboðið um at fara í nevndina. Eg metti, at hetta var ein sera spennandi uppgáva, og tók tí av, sigur Tormóður Djurhuus, sum hevur havt nógv álitisstørv gjøgnum tíðina.

Tormóður er annar av føroyingunum í nevndini, sum varð skorin úr sjey limum niður í fýra limir, tá hon var umskipað herfyri.

Umframt Tormóður umboðar Klæmint Weihe føroysku íleggjararnar. Jóna Hallgrímsson, sum var formaður í nevndini, umboðar íslendsku pengarnar, og fjórði nevndarlimurin er Morgan Goodladd úr Hetlandi.

## Sjálvrannsakan

Tormóður Djurhuus heldur fremstu uppgávu sína sum nevndarformaður verða at syrgja fyri, at Smyril Line støðugt mennir seg.

– Tað er umráðandi, at Smyril Line veitir eina góða tænastu, og vit skulu allatíðina ansa eftir, at neyðugu betringarnar verða gjørdar, sigur hann.

– Eitt og hvørt felag má verða í eini støðugari sjálvrannsakan fyri at halda seg á toppinum, og soleiðis skal tað eisini verða við Smyril Line.

Tormóður heldur uppgávuna í nevndini hjá Smyril Line verða spennandi.

– Í grundini kann tað gera tað sama, um tú arbeiðir fyri eitt lítið ella stórt felag. Hóast tað kanska er meiri at taka sær av í einum stórum felagi sum Smyril Line, so er aðalmálið tað sama, at arbeiðið skal altíð gerast væl og virðiliga, sigur Tormóður Djurhuus.

– Nevndin skal fylgja væl við gongdini í felagnum og verða við til at tryggja, at felagið kann menna seg, og at neyðugu broytingarnar og betringarnar verða gjørdar, sigur hann.

## Norrøna tryggjar sambandið

Nýggi nevndarformaðurin heldur ikki, at nevndararbeiðið verður truplari av, at útlendskir íleggjarar eru umboðaðir við einum trivaligum parti av partapeninginum.

– Vit í nevndini eru staddir í trimum ymiskum londum, so tað kann kanska verða eitt sindur truplari at savna nevndina, men tað er eingin stórur trupulleiki, sigur Tormóður Djurhuus.

– Hyggja vit eftir, hvaðani partapeningurin í Smyril Line er, kunnu vit staðfesta, at hetta eru lond, sum hava somu áhugamál sum Føroyar. Tí rokni eg als ikki við trupulleikum í nevndararbeiðnum. Vit hava felagsáhugamál í hesum sambandi, og teimum áhugamálum skulu vit arbeiða fyri.

Norrøna er ein týðandi liður í sambandinum hjá Íslandi, Føroyum og Hetlandi við meginlandið – bæði tá talan er um ferðafólkaflutning og farmaflutning.

– Fyri føroyingar verður tað altíð neyðugt at sigla, og Norrøna hevur gjørt sambandið við grannalondini smidligari. Tá vit fáa nýggju Norrønu verða umstøðurnar enn betri, og tað skapar samastundis nýggjar møguleiakr, sigur Tormóður Djurhuus.

## Skulu selja Føroyar

Tá nýggja Norrøna um nøkur ár fer í sigling millum Føroyar og grannalondini, verður sjóvegis sambandið nógv betrað, men uppgávan hjá Smyril Line verður eisini størri.

Nógv fleiri fólk skulu brúka Norrønu, skal skipið bera seg, og tað verður upp til Smyril Line at syrgja fyri, at Norrøna fær nóg mikið av viðskiftafólki.

– Stóra uppgávan verður at selja Føroyar til grannalondini. Marknaður er sera risa stórur, men tað er neyðugt, at vit eru aktiv í søluarbeiðnum, so vit fáa nógv ferðafólk við Norrønu.

– Tað er eisini neyðugt, at vit alla tíðina gera eitt uppfylgjandi arbeiði, so vit hava nøgdar kundar, sum kunnu viðmæla Føroyar og Norrønu til onnur, sigur Tormóður Djurhuus.


Hav skil á...



Við Handspring Visor Edge v/Palm OS software, versión 3.5.2H hevur tú atgongd til alt - allastaðni...kalendara, adressubók, minnislistar, roknimaskinu, ur, alarm - og við Springboard expansion kanst tú stilla um til digitalkamera, tráðleyst modem ella fartelefon.... Eisini er Visor Edge kompatibul við túsundatals Palm OS programm.

Visor Edge fyllir sera lítið í lummanum ella taskuni.

handspring™

Kr. 4.695,-

...við Visor Edge

3arin ELECTRONIC

SMS · Tel 353537 · Fax 322535 · E-mail: elektronik@3-arin.com


# Svimjihøllin letur aftur

**Klaksvík:** Tá umvælingarnar av svimjihøllini í Klaksvík væntandi byrja síðst í hesum mánaðinum, verður høllin stongd. Og klaksvíkingar mugu klára seg uttan svimjihøll í longri tíð, tí umvælingarnar eru umfatandi, og tað ganga fleiri mánaðir, áðrenn svimjihøllin kann lata upp aftur.

Tvey tilboð eru latin til umvælingararbeiðið, og nú skal umsitingin hjá Klaksvíkar kommunu kanna hesi tilboð og gera avtalu við tað felagið, sum skal umvæla høllina.

Tá hetta er klárt, verður beinanvegin farið undir arbeiðið. Enn er dagur ikki settur á, nær svimjihøllin letur aftur.

**ek**

# 50 biðið um grundstykki

**Klaksvík:** Klaksvíkar kommuna hevur í løtuni 50 umsóknir um grundstykki liggjandi.

Kommunan fer nú at gera eina nýggja útstykking á Helnabrekku, og har verða 24 grundstykki tøk. Hetta tal kann vaksast upp í 38 grundstykki, um útstykkingin heldur fram. Eini 90 grundstykki eru í løtuni á privatum hondum í Klaksvík.

Umframt útstykkingina á Helnabrekku verður eisini roknað við, at nýggja sambýlið og eldraíbúðirnar í Kráarbrekku fara at bøta um búðstaðarmøguleikarnar í Klaksvík.

**ek**

gult5 cyan5 magenta5 svart5



# Kommunur vilja nú hava størri sjálvstýri

**– Landsstýrið skal ikki longur gera av, hvussu nógv, hvør einstøk kommuna skal sleppa at byggja út fyri um árið, sigur formaðurin í Føroya Kommunufelag.**

KOMMUNALAR ÚTBYGGINGAR
*Áki Bertholdsen*



*– Landsstýrið hevur ikki heimild til at nokta kommununum at gera skilagóðar íløgur. Tí vilja vit hava markið tikið av, sum landsstýrið hevur sett í gildið fyri, hvussu nógv kommunurnar kunnu byggja út, sigur Jacob Vestergaard, formaður í Kommunufelagnum*

– Í tvey ár hevur landsstýrið sett hámark fyri, hvussu nógv hvør einstøk kommuna kann byggja út fyri. Men hetta hámarkið, skal nú takast av.

Tað heldur Føroya Kommunufelag.

Jacob Vestergaard, formaður í Føroya Kommunufelag, sigur, at íløguloftið, sum tað vanliga verður nevnt, er eitt haft um beinið á kommununum og tí vil felagið hava tað tikið av.

Tað var við tí fyri eyga at hava tamarhald á, hvussu nógvur peningur varð brúktur í landinum til verkløg og útbyggingar av ymsum slag, at landsstýrið fyri tveimum árum síðani gav hvørjari kommunu eina útbyggingarkvotu.

Mark varð sett fyri, hvussu stórar útbyggingar allar kommunurnar kundu byggja út fyri tilsamans. Hvør kommuna fekk so sín part eftir fólkatalinum.

## Ongin heimild

Men nú Landsstýrið hevur boðað kommununum frá, at hámarkið eisini skal vera í gildi komandi ár, fer Kommunufelagið at tala at. Jacob Vestergaard sigur, at fundur verður við Fíggjarmálastýrið ein av døgunum um at fáa hámarkið tikið av. Hann heldur fyri tað fyrsta, at Landsstýrið als onga heimild hevur til at áseta eina útbyggingarkvotu fyri kommunurnar.

– Ein slík heimild er ikki staðfest nakrastaðni, so tvíheldur Landsstýrið um, at kvotan eisini skal verða galdandi næsta ár, er minsta kravið, at málið verður lagt á ting, so at Løgtingið kann samtykkja at geva landsstýrinum hesa heimildina. Hann sigur, at útbyggingarkvotan er eisini í andsøgn við nýggju kommunulógina.

– Eftir henni er púra greitt, at kommunurnar hava fíggjarligt frælsi undir ábyrgd. So leggja tær eina skilagóða fíggjarlóg, hevur Landsstýrið ongan rætt at leggja seg út í tað. Eftir kommunulógini kunnu kommunur ikki lána meiri enn eina álíkning, so tað forðar kommununum í at fara út á sjógv.

## Onga ávirkan

Hann sigur, at Kommunufelagið metir heldur ikki, at hámarkið hevur havt nakra serliga ávirkan.

– Kommunalar útbyggingar viga øgiliga lítið í landsins búskapi, í hvussu so er útbyggingar í teimum smáu og miðalstóru kommununum úti um landið. Tað er eisini eyðsæð, at alsamt størri og størri partur av landsins fíggjarlóg endar í miðstaðarøkinum. Hvørja ferð lønirnar hækka og hvørja ferð, eykafíggjarlógir verða gjørdar, endar meginparturin av útreiðslunum í miðstaðarøkinum.

– Tí er meiningsleyst at lata kommunurnar úti um landið vera uppi í eini skipan við útbyggingarkvotum.

Hann sigur, at sjálvsagt skal búskapurin stýrast, men tað skal gerast við fíggjarætlanini, tí tað er hon, sum er nokk so avgerandi fyri virkseminum í miðstaðarøkinum.

Formaðurin í Kommunufelagnum vísir hinvegin á, at nógva staðni kring landið er útbyggingarkvotan ein stórur vansi hjá kommununum.

– Tað eru kommunur sum eiga pening á bók og sum hava hug at byggja út. Men tær sleppa ikki, tí tær renna seg ímóti kvotuni alla tíðina.

Hann vísir m.a. á, at Fugloyar Kommuna kann ikki byggja út fyri meiri enn 130.000 krónur um árið, longri røkkur kvotan hjá teimum ikki.

– Tað er neyvan fyri meiri enn spaðar, trillubørur og hakkarar og onnur amboð, sum skal til fyri at fara undir at byggja eitt ella annað. Tí er Fugloy, og aðrar kommunur, fullkomiliga niðurbundnar.

## Fleiri hava ráð

Jacob Vestergaard sigur, at tað eru fleiri kommunur, sum hava ført ein sera varnan fíggjarpolitikk í nógv ár, og sum hava lagt pening til síðis, men sum hava ætlað sær undir ymsar útbyggingar, sum liggja á láni.

– Tað kann ikki vera rætt, at tær skulu verða forðaðar í tí av eini útbyggingarkvotu, sum landsstýrið smoyggir niðuryvir tær.

–Eitt heilt annað er tað, at eftir kommunulógini hava kommunur ikki heimild at krevja meiri inn skatti frá fólki enn tað, sum kommunan eigur.

– Tær kommunur, sum nú eiga nakrar krónir á bók hava tískil tvinnandar kostir. Antin lata tær verða við at áleggja borgarunum kommunuskatt, til tann samanspardi peningurin er uppi. Ella sleppa tær at brúka peningin til tað, hann var ætlaður til, nevniliga ymsar útbyggingar.

Jacob Vestergaard sigur, at tí er tað nógv, sum talar fyri at taka útbyggingarkvotuna av og tað fer Kommunufelagið nú at arbeiða fyri.

# Sprongja loftið so dyggiliga

**Kommunufelagið vil hava Landsstýrið at gera eina nágreiniliga lýsing av, hvat er ein kommunal bygging og hvat er ikki**

KOMMUNAL BYGGING
*Áki Bertholdsen*



*Síðani landsstýrið setti hámark fyri, hvussu nógv hvør einstøk kommuna kann byggja út fyri, hevur hugflogið verið stórt fyri at sleppa upp um markið, sigur formaðurin í Kommunufelagnum. Men hendan myndin er tilvildarlig*

– Tað er neyðugt, at landsstýrið nú ger eina nágreiniliga lýsing, definitión, av, hvat ein almenn bygging er. Tað heldur Førooya Kommunufelag.

Jacob Vestergaard, formaður í Føroya Kommunufelag sigur, at síðani landsstýrið fyri tveimum árum síðani álegði hvørjari einstakari kommunu eitt hámark fyri, hvussu stórar útbyggingar tær kunnu fremja, hava nógvar kommunur roynt ymsar mátar at sleppa undan hesi avmarking.

Hann sigur tí hevur Kommunufelagið leingi roynt at fáa eina nágreiniliga útgreining av, hvat ein kommunal bygging er.

– Tað er onki dulsmál, at tað einasta ið krevst fyri at sleppa upp útbyggingarhámarkið hjá Landsstýrinum, er eitt sindur av hugflogi.

Hann vísir m.a. á, at síðani hámarkið varð sett í gildið, hava fleiri kommunur funnið ymsar kynstrigar útvegir fyri at kunna byggja út.

– Hetta hevur ført við sær, at í veruleikanum hava fleiri kommunur sprongt loftið so dyggiliga. Men hann vil ikki nevna nøvn.

– Eitt nú eru kommunur farnar at leggja ymsar útreiðslur undir vanligan rakstur, sum fyrr hava verið roknaðar at vera íløgur. Vit vita eisini, at summastaðni hava privatar fyritøkur hava bygt vinnuvirki av ymsum slag, sum kommunan síðani leigar. Og hvat við sjálvsognarstovnum kring landið.

Jacob Vestergaard sigur, at mátarnir eru so nógvir og tí vil Kommufelagið hava Landsstýrið at gera eina kunngerð, sum púra greitt sigur, hvat er ein kommunal bygging og, hvat er ikki.

Í Kommunufelagnum eru 40 kommunur limir. Í Føroyum eru 48 Kommunur, men seks tær størstu kommunurnar, Tórshavn, Klaksvík, Vágur, Tvøroyri, Runavík og Fuglafjarðar kommunur eru limir í Kommunusamskipan Føroya. Samstundis eru Hósvíkar- og Mykinesar kommuna ikki í Kommunufelagnum. Sunda Kommuna fór eisini burturúr Kommunufelagnum fyri nøkrum fáum árum síðani, men er nú komið uppí aftur.


Síggj Europa

við Atlantic Airways!

| | | | |
|---|---|---|---|
| Genéve | Prísir úr 3.815,- | Riga | Prísir úr 4.625,- |
| London | Prísir úr 3.565,- | Bruxelles | Prísir úr 3.440,- |
| Lisboa | Prísir úr 5.065,- | Dublin | Prísir úr 4.725,- |
| Oslo | Prísir úr 3.845,- | Zurich | Prísir úr 3.690,- |
| Barcelona | Prísir úr 4.350,- | Istanbul | Prísir úr 5.310,- |
| Prag | Prísir úr 4.625,- | Nice | Prísir úr 3.625,- |
| Berlin | Prísir úr 3.796,- | Rom | Prísir úr 3.790,- |
| Budapest | Prísir úr 4.580,- | Wien | Prísir úr 4.675,- |
| Gøteborg | Prísir úr 3.190,- | Helsinki | Prísir úr 4.335,- |
| Hamburg | Prísir úr 3.190,- | Malaga | Prísir úr 3.975,- |
| Madrid | Prísir úr 3.975,- | Warzawa | Prísir úr 4.190,- |
| Paris | Prísir úr 3.565,- | Amsterdam | Prísir úr 3.315,- |
| Venedig | Prísir úr 4.870,- | Frankfurt | Prísir úr 3.565,- |
| Stockholm | Prísir úr 3.240,- | Manchester | Prísir úr 4.285,- |
| Athen | Prísir úr 4.970,- | Tel Aviv | Prísir úr 5.505,- |

*Íroknað prísin er flogferð aftur/fram Føroyar - Keypmannahavn við Atlantic Airways og víðari við SAS. Møgulig gisting í samband við ferðina og ferðaavgjøld eru ikki íroknað. APEX treytir eru galdandi og møguleiki er fyri at steðga í Keypmannahavn í mesta lagi 2 dagar.*

***Ferðirnar kunnu bíleggjast á øllum ferðaskrivstovum kring landið.***

*Sí annars øll okkara góðu tilboð í blaðnum "Út í heim"*

ATLANTIC AIRWAYS
Tel. 34 10 10 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo